

# FISKIMÁLARÁÐIÐ ROYNIR EFTIR 2 DEILDARLEIÐARUM

Fiskimálaráðið er í løtuni á eini leið við stórum avbjóðingum. Burtur úr rúgvuni kann nevnast arbeiðið at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, og arbeiðið at broyta bygnaðin í Fiskimálaráðnum. Í hesum sambandi dyrgja vit eftir tveimum deildarleiðarum. Mynstrað verður 1. februar 2006, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Tekur tú kjansin, fært tú eitt starv við fjølbroyttum uppgávum í mennandi, yrkisligum umhvørvi. Hevur tú áhuga og áræði at taka lut í og ávirka umfatandi menningina, er Fiskimálaráðið rætta miðið.

## DEILDARLEIÐARI FYRI LØGDEILDINA:

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum løgfrøðingur, duga væl at samstarva og eisini tora at vera í sjálvdrátti.

**Høvuðsuppgávurnar í starvinum eru**:
- at veita løgfrøðiliga ráðgeving innan tilbúgving og fiskivinnu- og sjóvinnumál,
- at tilevna uppskot til lógir, kunngerðir v.m., innan fiskivinnuøkið, tilbúgving og aðra lóggávu á sjóvinnuøkinum,
- at veita løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við sakarmál, ið antin er lagt ímóti ella av Fiskimálaráðnum, um eitt mál eigur at kærast v.m.,
- at umsita onnur mál hjá Fiskimálaráðnum, har mett verður neyðugt við løgfrøðiligari viðgerð, antin við sjálvstøðugari málsviðgerð ella saman við løgfrøðingum uttan fyri ráðið,
- at umsita løgfrøðiligu umsitinginia av fiskiveiðisáttmálum, veiðireglum, veiði- og fiskiloyvismálum, inn- og útflutningsloyvum og fiskiveiðieftirlitinum.
- Skipaskrásetari.

## DEILDARLEIÐARI FYRI FÍGGJAR-, STARVSFÓLKA- OG UMSITINGARDEILDINA:

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum búskaparfrøðingur frá lærdum háskúla, duga væl at samstarva og eisini tola at vera í sjálvdrátti, eins og hann skal hava hollar royndir innan virkisøkið.

**Høvuðsuppgávunar í starvinum eru:**
- Ábyrgd av fíggjarstýringini í Fiskimálaráðnum og stovnunum undir tí.
- Ábyrgd av starvsfólkaviðurskiftunum í Fiskimálaráðnum.
- Ábyrgd av umsitingar- og edv-økinum í Fiskimálaráðnum.
- At samskipa felags stevið í innan- og uttanhýsis samskiftinum innan virkisøkið.
- At ráðgeva og vegleiða í tvørgangandi málum í Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin.

Størvini verða bæði lønt sum deildarleiðari I sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðngafelag Føroya. Starvsøkið fatar um Fiskimálaráðið, stovnar undir Fiskimálaráðnum, Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum, lívsgongdarlýsing og øðrum kann sendast til:

**Fiskimálaráðið**
**Heykavegur 6**
**100 Tórshavn**

Umsóknin skal vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi **10. januar 2006, klokkan 12.00**. Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Herálvur Joensen, aðalstjóra, telefon 35 30 30. Lýsingin sæst eisini inni á www.fisk.fo.

www.fisk.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU - VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI - VIT VILJA VITA - VIT BRÓTA SLÓÐ

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.*
*Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis røkir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umfram norðurlendskum samstarvi.*